Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Læraraútbúgvingin

Spurningur:

Hvussu gongst við arbeiðinum at eftirmeta læraraútbúgvingina og nær kann væntast, at hetta verður liðugt?

Viðmerkingar:
Læraraútbúgvingin hevur alstóran týdning fyri fólkaskúlan, sum er ein av grundsúlunum í samfelagnum, og er fortreyt fyri framtíðina hjá børnum okkara og tí eisini samfelagnum øllum. Semja tykist vera um tørvin á at eftirmeta læraraútbúgvingina. Landsstýrismaðurin hevur eisini víst á hendan tørv. Tí er spurningurin, hvussu gongur við hesum týdningarmikla arbeiði.

Á Løgtingi, 16. juni 2021

Sirið Stenberg